# Gallaveitslan avlýst

Ætlaða galla-veitslan fyri fótbólt, sum skuldi verða um vikuskiftið, er avlýst. Fyrireikararnir mettu, at undirtøkan fyri tiltakinum var ov lítil, og tí er avgerð tikin um, at veitslan verður av ongum. Hæddarpunktið á sjálvari veitsluni er vanliga, tá bestu spælararnir í farna kappingarári verða heiðraðir, men hendan handanin verður tó gjøgnumførd. Nøvnini á teimum, sum hava staðið seg best, verða nevnliga kunngjørd í Miðlahúsinum komandi fríggjadag.



# Hann var ikki í Mexico

Tað, sum allur súkkluheimurin hevur vitað av leingi, varð staðfest í gjár. Danski súkklarin, Michael Rasmussen, sum í summar varð tikin úr Tour de France kappingini, staðfesti á tíðindafundi í gjár, at hann ikki var í Mexico, soleiðis sum hann annars hevði fráboðað altjóða doping-eftirlitinum. Hinvegin staðfesti hann, at felag hansara, Rabobank, var væl vitandi um hetta. – Orsøkin til hetta var hjúnarbandsávur, segði Michael Rasmussen, sum tó ikki vildi greina hesa útsøgn nærri. Men hann staðfesti, at hann ongan tíð hevur skákað sær undan nøkrum doping-eftirliti, og hann tóktist illur um at Rabobank segði seg hava snýtt teir. – Tú kanst ikki snýta ein, sum veit, hvat gongur fyri seg, segði "høsnarungin", ið annars vónar, at hann skjótt aftur kann taka sæti á hjólhestinum í altjóða kapping.

# Stjørnan vil hevna seg

**Higar til hevur útidysturin móti VB givið Stjørnuni einasta ósigurin. Og lítil ivi er um, at meistarnir hava nakað at prógva, tá tær fara á vøllin leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað líktist onkrum slag av uppgerð við vanahugsan, tá VB tók øll á bóli við sigri á Stjørnuni, tá liðini hittust í Vági fyri trimum vikum síðani. Fram til tá var einasti spurningurin, sum fleiri hondbóltskøn settu sær, hvørt tað skuldi eydnast Stjørnuni at fara ósigraðar gjøgnum kappingarárið.

Tað megnaðu tær so ikki, men dystirnir síðani hava prógvað, at Stjørnan helst eigur sterkasta kvinnuliðið í landinum. Ein staðfesting, sum tær so avgjørt vilja prógva, nú VB kemur á vitjan. Og so er spurningurin, hvørt tað enn eina ferð skal eydast VB at skala favorittarnar.

Leygardagin er eisini dystur í Vestmanna, har Neistin er favorittur, tá tær vitja VÍF.

Seinasti dysturin í Sunset-kappingini hetta umfarið verður í Havn sunnudagin, tá Kyndil tekur móti StÍF.




*Í Vági var Stjørnan fyri higar til einasta stigamissinum hetta kappingarárið*

**Meistaradeild kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 3 | 3 | - | 0 | 9 | 3 | 6 | 6 |
| 2 | Dráttur | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 6 |
| 3 | KÍF | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 4 |
| 4 | SÍ | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 4 |
| 5 | Mjølnir | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 6 | Fleyr | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |
| 7 | TB | 3 | 0 | - | 3 | 2 | 9 | -7 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| 2 | SÍ | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 4 |
| 3 | Fram | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 4 | Mjølnir | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 5 | Fleyr | 3 | 0 | - | 3 | 2 | 9 | -7 | 0 |

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 157 | 117 | 40 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 107 | 84 | 23 | 6 |
| 3 | VB | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 80 | 77 | 3 | 5 |
| 4 | StÍF | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 108 | 123 | -15 | 3 |
| 5 | Kyndil | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 109 | 132 | -23 | 3 |
| 6 | VÍF | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 100 | 128 | -28 | 3 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 153 | 127 | 26 | 10 |
| 2 | StÍF | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 148 | 123 | 25 | 6 |
| 3 | Kyndil | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 119 | 135 | -16 | 6 |
| 4 | H71 | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 132 | 133 | -1 | 4 |
| 5 | VÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 132 | 141 | -9 | 4 |
| 6 | KÍF | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 117 | 142 | -25 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

***Hondbóltur***
**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 10.11 | 14.30 | VÍF-Neistin |
| 10.11 | 17.00 | Stjørnan-VB |
| 11.11 | 14.30 | Kyndil-StÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 10.11 | 16,00 | VÍF-Neistin |
| 11.11 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 11.11 | 16.00 | H71-KÍF |

***Flogbóltur***
**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 11.11 | 14.00 | Mjølnir-ÍF |
| 11.11 | 14.00 | SÍ-Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 11.11 | 16.00 | Fleyr-Mjølnir |

## Landsliðs-venjing avlýst

Hóast heimliga fótbólts-kappingin er av, so merkir tað ikki, at føroysku landsliðsspælararnir hava fingið frí. Tann 21. november stendur kanska størsta uppgávan nakran tíð fyri framman, tá Føroyar á útivølli skulu dystast móti italsku heimsmeistarunum. Men tað ber illa til at siga, at umstøðurnar undan hesum eru optimalar. Nakrar venjingar eru tó settar á skránna, men longu nú er greitt, at tann fyrsta av hesum verður av ongum. FSF boðaði nevnliga í gjár frá, at vetrarveðrið, sum nú ger um seg, forðar fyri veruligari fótbóltsvenjing.

**-mørk**

## AaB fekk javnleik

Jón Rói Jacobsen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá AaB í gjár spældi móti belgiska Anderlecht í UEFA -Cup kappingini í fótbólti. AaB hevði nógv spæl fyri steðgin, men í seinna hálvleiki løgdu gestirnir seg á odda eftir sjálvmál frá AaB. Seinastu løtuna løgdu vertirnir nógv fyri í royndini at javna, og bara fýra minuttir fyri leiklok kundi innskifti Mattias Lindstrom senda bóltin í netið til 1-1. Hjá hinum danska luttakaranum, FCK, gekst einki serligt. Teir tóku á heimavølli móti grikska Panthinaikos, og tann dystin vunnu gestirnir 1-0.

**-mørk**